Tíðindablaðið
sosialurin
Internet: www.sosialurin.fo

Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov

Marknaðardeild: Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen
Blaðfólk: Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Dánjal Højgaard

Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakstein, Høgni Mohr
Ítróttur: Jákup Mørk

Myndamenn: Jens Kristian Vang, Ólvur Haraldsen
Útgevari, uppseting: Sp/f Sosialurin
Bústaður: Argjavegur 26, Argir

Postadr: Postsmoga 76, 110 Tórshavn
Telefon: 311820
Telefax. 314720
e-mail: post@sosialurin.fo
Lýsingar: lysing@sosialurin.fo
Prent: Sosialurin

Undirbrotligheitin

Oddagrein

Vit hava ikki ábyrgdina av flóttarfólkamálum, tí kunnu vit ikki taka støðu í málinum ella geva viðmæli um serbisku flóttafólkini. Vit føroyingar eru bert at meta sum eitt kommunustýri í hesum málinum. Hettar eru orð Høgna Hoydals. Um Føroya Landstýri var at meta sum eitt kommunustýri, so hevði danska stjórnin neyvan biðið um tilmæli frá Føroya Landstýri. Høgni Hoydal hevur sjálvur úttalað seg um hettar málið fyrr, og liggur nú sum hann sjálvur hevur reitt og torir eftir øllum at døma ikki at taka støðu í málinum. Føroya Landstýri tørvar ikki nøkrum evsta valdi fyri at geva eitt tilmæli, ið við vissu verður fylgt av donsku myndugleikunum. Tað tykist sum um, at parolan, ið sigur, at tá vit fáa fullveldi, so verður alt gott, eisini umfatar, at vit kunnu ikki hettar og hava ikki heimild til hattar uttan so, at vit fáa fullveldi.

Er tað so, at Føroya landstýri roynir at skáka sær undan ábyrgd við at tosa um heimildir, so er spurningurin, um teir ikki áttu at givið skarvin yvir til flokkar, ið megna at liva upp til ta ábyrgd, ið teir hava fingið frá føroysku veljarunum.

Løgið er, at føroyingar ikki kunnu frá- ella tilmæla um flóttarfólk, tí at lóggáva um økið ikki er uppá pláss og at heimildirnar liggja í Danmark. Landstýrið himpraðist ikki við at innkalla útlendskar sendiharrar og sendistovustarvsfólk til sokallaðan kunnandi fund um fullveldisætlanina í Keypmannahavn, hóast Føroya Landstýri formelt ikki hevur uttanlandsmál. Heldur Høgni Hoydal eisini, at vit skulu gevast við at samráðast um fiskiveiðuavtalur við aðrar tjóðir, tí vit ikki hava evsta vald og fullu ábyrgdina av uttanlandsviðurskiftum?

Í einum landi við 46.000 íbúgvum má væntast, at viðhvørt stinga mál seg upp, har øll lóggáva ikki er uppá pláss. Sjálvandi er best, um lóggáva er fingin uppá pláss, men eitt Landstýri kann ikki seta seg hendur í favn og bíða við avgerðum í upp til fleiri ár, tí lóggáva ikki er gjørd til fulnar.

Vit mugu ansa eftir, at tað ikki eydnast hesari samgonguni at steðga øllum upp fyri at royna at fáa tesuna, har einki ber til uttan fullveldi, til veruleika við ikki at vilja taka støðu, tí tað sambært teimum undirbrotligu ikki ber til undir heimastýrislógini. Siðvenja er, at tá føroyingar fyrst hava fingið avgerðarrætt á einum øki, so verður hann ikki tikin frá okkum aftur. Eitt er vist, og tað er, at um danska stjórnin gav serbisku flóttafólkunum uppihaldsloyvi í Føroyum utttan at spyrja Landstýrið eftir, so hevði verið ramaskríggj úr Føroyum.

Pínligt er tað, men kann tað veruliga hugsast, at Landstýrið stingur høvdið í sandin, og vil ikki taka støðu í flóttarfólkamálum, tí lættast er at sleppa frá í slíkum kensluburnum málum?

Sosialurin

Viðmerking:

Samband ella loysing

Hvat vilja føroyingar, samband ella loysing? Tað er tað, sum politiska stríðið stendur um. Vit í Sambandsflokkinum hava ongantíð verið í iva um

- at tað er í ríkisfelagsskapinum, at Føroyar kunnu gerast alt meira sjálvbjargnar.

- at tað er í ríkisfelagsskapinum, vit varðveita og menna vælferðarsamfelagið.

- at tað er í ríkisfelagsskapinum, vit geva komandi ættarliðum fjølbroyttar møguleikar eisini í altjóða høpi.

Landsstýrið og tey sum standa aftanfyri tað, vilja hava loysing frá hinum partinum av ríkinum. Eydnast henda loysingarætlan, so fær hon ikki bara álvarsligar fíggjarligar avleiðingar fyri Føroya fólk, men føroyingar missa eisini grundlógartryggjaði rættindi, sum ikki kunnu metast nóg høgt.

Landsstýrið má frá

Sitandi samgonga bleiv skipað júst til at fremja loysingina. Tí má tað vera soleiðis, at eydnast tað ikki landsstýrinum at fremja sín altavgerandi málsetning, so má landsstýrið fara frá og val útskrivast.

Ein miseydnaður politikkur, má fáa politiskar avleiðingar.

Alternativið

Alternativið til politikkin hjá landsstýrinum er Nýskipanaruppskot Sambandsfloksins.

Føroya fólk vil hava nýskipanir av ríkisviðurskiftunum, og ikki loysing. Tí eigur landsstýrið at leggja frá sær, so at vit kunnu fara undir arbeiði, sum er at fremja fólkaviljan.

Loysingarætlanin hevur kostað alt ov nógv

Vit skulu minnast til, at verandi landsstýri hevur staðið fyri eini politiskari ætlan, sum bæði hevur kostað hópin av milliónum krónum, og hevur sett nærum alt annað til síðis í føroyska samfelagnum í tvey ár. Umframt tað, hevur politikkur samgongunar forpestað viðurskiftini í ríkisfelagsskapinum á flestu økjum.

Slíkt má sjálvandi fáa politiskar avleiðingar beinanvegin. Alternativið er Nýskipanaruppskot Sambandsfloksins, sum er ein nýmótansger ríkisviðurskiftunum samsvarandi fólkaviljanum.

Landsstýrið má tí fara frá, so at aðrar kreftir kunnu fara undir hetta arbeiðið.

7. juni 2000
Edmund Joensen

Tøkk til ungdóm úr Gøtu

Nú sær út til, at eggið er farið at læra hønuna. Í Gøtu hevur stríð altíð staðið um og úr missiónshúsinum, Uni tú skalt vita, at tað eru fleiri, sum eru skelkað av ungdómi í Gøtu, tú ert ikki fyrsti persónur, sum ikki ert góður nokk fyri fundamentalistarnar í missiónshúsinum í Gøtu, tað er hent fyrr, tað er ikki vert at ríva upp gomul sár her. Uni, vónandi tekur tú ikki hesi ungu so tungt, og vónandi kemur tú skjótt aftur til Gøtu at hava gudstanastu í okkara fínu kirkju.

Olofsson kom, hann sáðaði, og tað bleiv tann bera svartaspilla, tað besta er so, at vit eru sloppin av við handan mannin, og at nú kann man fara til gudstænastu uttan at føla, at man verður fyltur við hatri og óndskapi móti øllum. Eitt annað er eisini, hvussu ber tað til, at Olofsson skal vera best lærdur prestur í ríkinum, hann fær ikki eitt tað einasta arbeiði sum prestur í Danmark. Hann skuldi við sínari vitan minst verið bispur, kanska staðið enn nærri Pávanun enn tað, við allari tí vitanini hann sigst hava.

Til ungdómin í missiónshúsinum í Gøtu eri eg sum foreldur helst noyddur at taka tað støðu, at børn míni ikki kunna koma í slíkt stað, har bert tílíkur óndskapur er. Man følir sum um tað eru islamskir fundamentalistar úr Iran, sum eru komnir og hava tikið maktina har. Eitt uppskot kundi verið at sunnudagsskúli var samstundis sum gudstanastan, hann kundi verið í kjallaranum, so kundu foreldur og børn farið samstundis og kanska fingið nakað gott burturúr.

Til prestarnar standi saman, um tað er neyðugt verið so bara vekk úr misiónshúsinum, har er onki gott at heinta kortini.

Til seinast vóni eg, at tit skamma tykkum, eg føli sera stóra skomm av at vera bygdarmaður tykkara.

Við vón um betran.

Jeffri Olsen
Syðrugøta

Stór hvítusunnustevna í Havn

Tað eru ikki bert bispar og kongalig, sum vitja Havnina á hvítusunnu. Heili 16 fólk koma úr Danmark at hava eina sokallaða krossferð (møtirað) í Havn á hvítusunnu. Danski vekingarfelagsskapurin „Evangelist" hevur leigað ítróttarhøllini á Hálsi á hvítusunnu, har ein fýra daga krossferð við vekingarfundum og bíbliuundirvísng verður hildin.

Tiltakið er gjørt í samstarvi við seks føroyskar samkomur, men tað er „Evangelist", sum hevur fíggjarligu ábyrgdina av krossferðini, sum hevur eina kostnaðarætlan uppá kr. 150.000 krónur. Aftan fyri felagsskapin „Evangelist" stendur Christian Hedegaard, ein 33 ára gamal prædikumaður úr Danmark. Hann hevur fyrr prædikað á krossferðum á afrikanska heimspartinum, men hesi seinnu árini er hann hildin uppat at ferðast so nógv fyri heldur at prædkia á okkara leiðum.

Á krossferðum í Afrika sær hann, hvussu mennisksju taka við evangeliinum og verða frelst, fríað frá illum andum og grødd frá enntá ógrødandi sjúkum. Tað sama væntar hann fer at henda í Føroyum. Føroyingar skulu síggja kraft Guds virka á vekingarmøtunum í ítróttarhøllini á Hálsi, sigur Christian Hedegaard, evangelistur.

Samkomurnar, sum samstarva um tiltakið vænta stór ting undir krossferðini, og tær hava longu havt samband við fleiri í felagsskapinum „Evangelist".

Í mars mánaða var danska sangkvinnan Lena Løbner í Føroyum fyri at savna eitt tvørkirkjuligt gospelkór við 40 - 50 sangarum, sum skulu luttaka við sangi og tónleiki undir krossferðini á hvítusunnu, og í mai mánaði var ein ungdómsbólkur her og vitjaði. Í sama mánaði var bókin „Sejr ov dæmoner" útborin í hvørt heim í Havnini.

Umframt hesi 16 fólkini úr Danmark, kemur kendi norski prædikumaðurin Enevald Flåten eisini at luttaka. Krossferðin byrjar fríggjadag og endar 2. hvítusunnudag. Hvønn dag verður seminar frá kl. 10.15 til kl. 12.15 og frá kl. 14.15 til kl. 16.15. Vekingarfundur verður fríggjadag og leygardag kl. 20.00 og 1. og 2. hvítusunnudag kl. 18.00. Tað verða tó ikki bert útlendingar at sígggja á pallinum í Ítróttarhøllini á Hálsi á hvítusunnu; limir úr samkomunum, sum samstarva við Evangelist, luttaka aktivt á stevnuni. Samkomurnar, sum samstarva við „Evangelist" eru: Betania, Skopun; Keldan í Skálabotni; Lívsins Orð í Runavík; Rhema í Havn; Evangeliihúsið í Havn; Filadelfia í Havn.

Marknaðardagur á Venjingarskúlanum

Leygardagin kl:10.00 hevur 8. b á Venjingarskúlanum ein stóran marknaðardag úti á stóra vøllinum við Læraraskúlanum. Har verður m.a: ponyríðing, fiskibrunni, hoppiborg, matsøla og mangt annað. Í Marknaðardagurin er til frama fyri námsferð hjá flokkinum í august mánaði til London.

Helst verður tað næsta hósdag at avgerðin fellur

– Kemur landsstýrið ikki aftur við einum góðum úrsliti av fundinum hósdagin, er fullveldisætlanin helst kolldømd, heldur Jóannes Eidesgaard, formaður Javnaðarfloksins

ÁKI BERTHOLDSEN

Hósdagurin verður allarhelst ein heilt avgerðandi løta fyri fullveldisætlanina hjá landsstýrinum.

Tað heldur Jóannes Eidesgaard, formaður javnaðarfloksins.

Hósdagin verður triði samráðingarfundurin ímillum landdsstýrið og donsku stjørnina um føroyskt fullveldi.

–Og tað er mangt, sum bendir á, at hetta verður fundurin, sum fer at gera av, antin, antin fullveldisætlanin kollsiglur, ella ikki.

Jóannes Eidesgaard heldur tað vera ógvuliga lítið sannlíkt, at partarnir fara at samráðast um smálutirnar í einum møguligum fullveldissáttmála fyri Føroyar.

–Helst verða tað tey stóru málini, sum fara at merkja fundarskránna og á fremst av øllum, skiftistíðin.

Jóannes Eidesgaard ivast stórliga í, um tað uppá nakran máta fer at bera til hjá landsstýrinum fáa eina longri skiftistíð enn tey trý, fýra árini, sum danska stjórnin ferð eftir ferð hevur boðað frá, verður tað, sum hon kann strekkja seg til.

– Danska stjórnin hevur ferð eftir ferð gjørt greitt, at talan verður bara um eina skiftistíð upp á trý, fýra ár.

Og tað er ongin ivi um, at danska stjórnin hevur heilt stóra undirtøku í fólkatinum fyri, at halda fast um eina skiftistíð uppá eini fýra ár.

– Eg vænti, at tann næsti fundurin hósdagin verður heilt avgerðandi fyri fullveldisætlanina hjá landsstýrinum. Og aftaná fundin kann tað væl henda, at løgmaður noyðist at leggja kongin, heldur Jóannes Eidesgaard, formaður javnaðarfloksins

– Eg havi ongum dansk- um politikara møtt enn, sum ikki tekur undir við stjórnini í hesum málinum.

Formaður javnaðarfloksins vísur eisini á, at stjórnin hevur greitt víst aftur, at útseta ígildiskomuna av fullveldissáttmálanum fyri at „keypa" Føroyum nøkur ára eyka skiftistíð afturat.

– Tað er heilt greitt, at úrslitið av samráðingunum ímillum Føroyar og Danmark skal setast í verk beinanvegin. Skal sáttmálin ikki koma í gildi um eini 10-15 ár, so verða samráðingarnar heldur ikki fyrrenn tá.

– Sostatt er tað onki, sum bendir á, at skiftistíðin verður longri enn tey fýra árini, sum stjórnin fleiri ferðir hevur fráboðað.

Stendur og fellur

So er spurningurin, hvar fullveldisætlanin stendur, um skiftistíðin ikki verður longri enn fýra ár.

Jóannes Eidesgaard heldur, at tað er mangt, sum bendir á, at fullveldisætlanin stendur og fellur við tí, sum fæst burturúr næsta samráðingarfundi hósdagin.

–Tað, sum er serliga áhugavert, er, at nú er fullveldismálið gjørt til eina danska avgerð, tí nú er tað danska stjórnin sum ger av, antin vit fáa fullveldið ella ikki. Tað veldst alt um hvat stjórnin vil ganga við til av skiftistíð.

–Og tað haldi eg, er ein ógvuliga mannminkandi støða fyri føroyingar.

– Men tað er jást tað, sum løgmaður ger, tí nú hevur hann tríggjar ferðir kunngjørt, at verður skiftistíðin bara trý, fýra ár, verður ikki talan um nakra fólkaatkvøðu.

–Og vit mugu ganga útfrá, at fullveldið verður ikki sett í verk, uttan at eina fólkaatkvøðu.

–Tí mugu vit eisini ganga útfrá, at sostatt er fullveldismálið kollsiglt.

Jóannes Eidesgaard sigur, at tað tí er vælhugsandi, at løgmaður eftir samráðingarfundin hósdagin verður noyddur at leggja kongin og at viðurkenna fyri Føroya fólki, at landsstýrið rakk ikki málinum.

– Og tað verður spennandi at síggja, hvussu løgmaður loysir tann trupulleikan.

–Í øðrum londum rundanum okkum er tað vanligur siður, at ein stjórn leggur frá sær, tá ið ein so stór, politisk ætlan miseydnast, so at onnur kunnu sleppa framat.

– Men møguliga kemur løgmaður heldur til ta niðurstøðu, at tað er vert at royna einaferð afturat, men við einum øðrum samráðingarupplleggið til donsku stjórnina.

Og tað verður helst eitt upplegg, sum meiri fer at líkjast tí, sum javnaðarflokkurin hevur lagt fram.

– Eg vænti tó, at tað verður trupult saman við tjóðveldisflokkinum, tí hann hevur ferð eftir ferð gjørt púra greitt, at ríkisfelagsskapurin er markið fyri, hvat flokkurin vil góðtaka.

Og tað skal skiljast soleiðis, at tjóðveldisflokkurin vil ikki góðtaka nakra sum helst avtalu við danir, sum ikki ber í sær, at Føroyar fara úr ríkinum.

– Tað verður ringt at siga, hvussu leikur ferð, men eftir næsta samráðingarfund fer uttan iva okkurt at henda, sigur Jóannes Eidesgaard.

Tónleikafestivalurin summartónar byrjar 23. juni

Tónleikafestivalurin Summartónar var fyrstu ferð í 1992.

Tað vóru føroysk tónaskøld og tónleikarar sum tóku stig til festivalin og aðalendamálið var at fáa føroysk tónlistaverk framførd á so høgum støði sum gjørligt, bæði av vitjandi útlendskum - og føroyskum tónleikarum. Festivalurin Summartónar hevur verið á hvørjum árið síðani og er hann vaksin munandi síðani byrjan. Nógv føroysk verk eru hesi árini løgd avtrat føroyska tónleikaskattinum, og fleiri eru nýggju føroysku tónaskøldini, sum hava sett av við at hava fingið framført tónleik í samband við Summartónar. Eisini hava føroyskir tónleikarar, bæði herbúgvandi og tey sum búgva í útlondum, havt stóra gleði og menning av festivalinun. Hann er blivin árliga savningarstaðið fyri føroysku klassisku tónlistafólkini.

Í ár verður Summartónar frá 23. juni til 3. juli og verða konsertir um alt landið. Høvuðsdenturin á festivalinum í ár verður lagdur á norðurlenskan tónleik av íslendska tónaskaldinum Atli Heimir Sveinsson og dananum Ib Nørholm, men eisini verður hugt útum norðurlond og har verður denturin í ár lagdur á Johannes Brahms.

Fyriuttan hetta, og nógv føroysk verk, verður eisini spældur alskins annar klassiskur tónleikur teir 11 dagarnar festivalurin varðir.

Sum nakað nýtt verður í ár kórstevnan Atlantsljómur hildin sum sjálvstøðugur partur av Summartónum. Kórstevnan verður hildin í tíðarskeinum 26/6 til 2/7-2000 og endar við tveimum konsertum í Norðurlandahúsinum 1. og 2. juli 2000. Hetta er á øðrum sinni, at „Atlantsljómur", í núverandi hami, verður fyriskipaður í Føroyum. Fyrstu ferð var í 1998, tá ið ‚Verdis Requiem' var framført á tveimum sera væl eydnaðum konsertum í Norðurlandahúsinum. Tað árið vóru 4 luttakandi kór; eitt úr Íslandi, tvey úr Noreg og eitt úr Føroyum. Orkestrið var Lyngby-Tårbæk Symfoniorkester úr Danmark og solistarnir vóru úr Íslandi og Polandi, og dirigentur úr USA.

Á konsertunum í ár verða trý verk eftir Johannes Brahms framførd, byrjað verður við "Akademische Festoverture" fyri orkestur, síðani "Schicksalslied" fyri kór og orkestur og endað verður við megnarverkinum „Ein Deutsches Requiem" sum eisini er fyri kór og orkestur. Kórið og orkestrið er hesuferð sett saman av tónleikarum og sangarum úr Norra, Danmark, Eysturríki og Føroyum. Solistarnir eru úr Danmark og Føroyum, meðan dirigenturin kemur úr USA.

Tað eru Føroysk Tónaskøld, sum í neyvum samstarvið við Norðurlandahúsið og Atlantsljóm leggja festivalin tilrættis.

Atgongumerkini til konsertirnar verða at fáa í Norðurlandahúsinum.

Skráin verður kemur at liggja frammi á støðum um alt landið fyrsta dagin.